## DAGSINS MEINING

# Løgmann ella løgmálaráð

Í meira enn ein mánað hevur Føroyar fólk livað í eini ómenniskjansligari óvissu um, hvør skal stýra landinum komandi fýra árini. Hóast valúrslitið gav samgonguni ein dyggan frammaná, hon misti meirilutan, so varð úrslitið eisini, at andstøðan fekk ikki neyðuga meirilutan til at koyra samgonguna frá. Hesa støðuna hevur løgmaður so brúkt – onkur sigur misbrúkt – til at savna ein meiriluta við sær sjálvum sum framhaldandi løgmanni. Nakað, sum Stýrisskipanarlógin loyvir honum, men sum mong halda ikki er í tráð við hvørki andan í hesi lóg ella við góðan demokratiskan sið.

Vit hava verið vitni til, hvussu ein flokkur fyri og annar eftir hevur verið til audiens, forhoyr og samráðing hjá fólkaflokshøvdinganum, fyri síðani at verða vístur aftur til úthurðina. Ikki er løgið at føroyingar eru ørkymlaðir.

Í gjár var so líkt til, at samgongan ADEH var komin undir land. Men tá hesi orð vórðu skrivað var framvegis stór óvissa um málsøki. Tað ljóðaði, at E vil hava løgmann, ið er eitt náttúrligt krav, nú teir eru størsti flokkur. Hetta kann so eisini vera reinur taktikkur, tí við at krevja tað besta fær man í hvussu er tað næstbesta. Og fyri E skuldi tað verið rættiliga náttúrligt at kravt, at landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum varð sitandi, hóast A og D helst mugu halda, at nú so lítið er eftir av sjálvstýrispolitikki komandi árini, er hetta nakað, sum hinir landsstýrismenninir hvør sær kunnu hava ábyrgd av.

Stóri spurningurin fyri E er tó meira at gera løgreglumál og rættarskipan og lógarmál til eitt serstakt málsøki, tað nógv umrødda løgmálaráðið. Men slíkt løgmálaráð kann t.d. D neyvan ganga við til, tí flokkurin hevur gjørt tað til ein kardinalspurningin, at løgreglan skal ikki yvirtakast í hesum skeiðnum. Tí vil tað vera logiskt og náttúrligt heldur ikki at góðtaka, at eitt løgmálaráð verður sett á stovn samtíðis sum endalig semja ikki er fyri yvirtøkuni.

Men tað er greitt, at tað kann hugsast, at tá E vil hava løgmanssessin og veit, at tað fær hann ikki, so er tað tí, at tað vil hava nýggja málsøkið – løgmálaráðið – í fastan karm longu nú, eisini hóast eingin avgerð er tikin um at yvirtaka økið í hesum skeiðnum. Kann hetta verða tað, sum skapar veruligu trupulleikarnar?

At stovnseta eitt løgmálaráð longu nú, tá avgerð er tikin um ikki at yvirtaka økið næstu fýra árini, kann tí tykjast ein øvugt raðfylgja. Men tá kunnu tjóðveldismenn kanska vísa til eina aðra politiska kabalu, nevniliga hana, at D eftir síðsta val fekk sín landsstýrismann í oljumálum, hóast eingin olja var funnin tá. Har er tó tann munur, at tað var breið semja, hvussu farast skuldi fram í oljumálinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Orsaka – ein meylbrølari!

**Sámal Matras Kristiansen,**
*grand-prix fjepp*

Tað var einki minni enn eitt sjokk at frætta, at ein tekstur, skrivaður av mær var endaður í føroysku bløðunum. Tað var ein reaktión uppá úrslitið av melodigrandprix'num, ið eg av misgávum havi sent til føroysku bløðini, ið sum vera man hava skilt tað sum eitt lesarabræv. Tað kann eg heldur ikki lasta redaktiónirnar fyri. Tann einasti, ið kann lastast í hesum málinum eri eg sjálvur. Eg havi verið so býttisligur at sent eina verbala spýggju út til øll somul á mínum meyllista, sum eg av og á havi lyndi at gera, tá ið eg onkursvegna eri uppøstur um eitthvørt.

Í øllum rusinum havi eg ikki hugsað um, at meyladressurnar hjá føroysku bløðunum eisini liggja inni á mínum meyllista, sum ger, at redaktiónirnar á Sosialinum, Dimmu og Fregnum hava fingið fatur í hesum heldur ótespiliga lesnaðinum. Eg orsaki margfaldar ferðir, at hetta er hent, og vóni at fólk ikki tóku hatta alt ov fult. Eitt tílíkt lesarabræv hevði eg ikki sent til bløðini og harvið eisini allar møguligar fremmandar føroyingar. Hatta er tílíkt man skrivar til fólk, ið man kennir, og sum duga at taka eina so óbarmhjartiga provokatión við einum smíli.

Orsaka, orsaka, orsaka minst túsund ferðir. Hatta skal ongantíð henda aftur. Eg havi fingið mær ein lærupening fyri lívið: Halt uppat við at senda brøv út til øll á meylboksini.

Fyribyrgingarráðið - spurningar og svar um tubbak:

# »At gevast«

*Hví er tað so ringt at gevast at roykja?*

Eitrið, sum er í tubbaki, er ikki minni turvelvandi enn heroin og kokain. Tá ið tú roykir tubbak, kveikjast mótstøðustøð í nervalagnum í heilanum. Tá ið móttøku-støðini ikki fáa nóg mikið av tubbakseitri, verður tú illa fyri. Kroppinum tørvar tubbakseitur bara til at føla seg vanligan.

*Er vanligt, at tú merkir, at tú roynir at gevast?*

Ja nógv ymisk merki hoyra vanliga til, tá ið tú roynir at gevast. Ikki øll føla tað sama, nøkrum fellir tað merkilliga lætt. Hjá øðrum stendur ikki so væl til í nakrar dagar.




*Hvørji felagseyðkenni eru, og hvat fái eg gjørt, so eg megni tað?*

Verður tú erkvisin – far ein gongutúr, far undir heitt brúsubað, anda djúpan, jagla tyggigummi við tubbakseitri í.

Verður tú eitt sindur í ørðviti – førka teg eitt sindur spakuligari, skift støðu spakiligari.

Fært tú ilt í høvdið – anda djúpan, fá tær eina aspirin.

Møðist tú – síggj til, at tú fært ein góðan svøvn, fá tær ein eykablund, royn og slepp tær undan trýsti, jagla tyggigummi við tubbakseitri í.

Kemur svøvnloysi á teg – fá tær einki kaffievni eftir klokkan 18.00, anda djúpan.

Fert tú at hosta – drekk nógv vatn, fá tær hostabomm ella kandissukur.

Fært tú ikki savnað tankarnar – royn at lætta um arbeiðsbyrðuna í nakrar dagar, slepp tær undan trýsti.

Broytist sodningin – drekk nógv vatn, et frukt og grønmeti saman við matinum, tú etur.

Følir tú svongd – drekk nógv vatn, hav munnbitar hjá tær, sum ikki eru fullir av kalorium og feitti.

Leingist tær eftir tubbaki – halt ímóti neyðini; neyðin fjarar burtur.

*Hvussu leingi merkir tú, at tú nýliga ert givin?*

Merkini eru bara fyri fyrst. Fyrstu tveir dagarnir eru vanliga teir ringastu. Tað er tíðin, tað tekur at skola tað mesta av tubbakseitrinum burtur úr kroppinum. Tær næstu tvær vikurnar siga roykjarar seg føla minni og minni.

*Hvussu »dragi« eg andan djúpan?*

Set teg niður ella legg teg og royn at hvíla. Fá hugin at klárna. Fyll lungini spakuliga, meðan tú telur upp í 5, halt andanum, meðan tú telur upp í 3 til 5. Blás so spakuliga luftina út, meðan tú telur upp í 5. Ger hetta 5 ferðir umaftur. At draga andan djúpan fyllir blóðið við súrevni og hevur tað við sær, at blóðtrýstið lækkar. Roykjarar kunnu læra seg hetta sum partur av fyrireikingunum til at gevast. Tað er gott at duga hjá øllum, sum royna at sleppa undan trýsti

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Foreldur í Skopun biðin um at blanda seg uttanum



*– Foreldrini í Skopun hava tikið atfinningarnar ímóti Ingun Simonsen úr leysum lofti og ikki eitt. einasta ítøkligt dømi er er nevnt, sigur sakførarin hjá fyrstalæraranum í Skopun. Hann sigur, at hetta er sera álvarsamt, tí tað setir bæði starvið og livibreyðið hjá fyrstalæraranum í vanda*

**Foreldur at skúlabørnum í Skopun hava fingið bræv frá sakførara, har hann biðjur tey lata vera við at blanda seg uppí ósemjuna í skúlanum**

SKÚLASTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*

**Skopun:** Skúlaleiðarin í Skopun fer ikki uttan víðari at finna seg í teimum skuldsetingum, sum eru førdar fram ímótu henni.

Tað ger sakførari hennara, Sigmund Poulsen, greitt í einum brævi til foreldrini í Skopun týsdagin.

Tað var í farnu viku, at tey flestu foreldrini at skúlabørnum í Skopun í farnu viku skrivaðu undir eina kæru til Mentamálastýrið, har tey kravdu, at skúlaleiðaran, Ingun Simonsen, verður koyrd úr starvi og at annar fyrstilærari verður settur.

Men nú hevur sakførarin hjá Ingun Simonsen skrivað foreldrunum, sum skrivaðu undir kæruna, bræv, har hann m.a. biðjur tey lata vera við at leggja seg út í stríðið í skúlanum.

Fleiri av foreldrunum siga, at tey skilja ikki brævið øðrvísi enn at tey verða hótt við stevning, halda tey ikki uppat við stríðnum ímóti fyrstalæraranum.

Í brævinum skrivar sakførarin nevniliga, at tað, sum foreldrini føra fram, »eru sera álvarsligar ákærur«, sum Ingun Simonsen »ikki uttan víðari ætlar at lata um seg ganga!«.

Hetta skilja fleiri fóreldur sum, at tey eru hótt við stevning, taka tey ikki kæruna aftur.

Hesum útihýsir sakførarin hjá Ingun Simonsen heldur ikki, men hann leggur dent á, at so langt hava tey ikki hugsað enn.

Úr Skopun hevur verið trupult at fáa nakað ítøkiligt at vita um atfinningarnar ímóti fyrstalæraranum, men í brævinum frá sakføraranum verður nomið eitt sindur við málið. Hann vísir á, at foreldrini hava kært um, at Ingun Simonsen skal vera orsøk til ófrið í Skopunar Skúla, at hon ikki megnar at stýra skúlanum og at hon alla tíðina leggur trupulleikar í vegin.

### Friður á skúlanum

Sakførarin skilir ikki, hvussu foreldrini kunnu seta slíkar atfinningar fram. Hann sigur, at friður er á skúlanum.

– Men har er eitt ótolandi persónligt stríð ímillum Sigurd Bærentsen og Ingun Simonsen, tí Sigurd Bærentsen ikki vil taka ímóti boðum frá skúlaleiðsluni.

Sakførarin sigur, at hetta stríð hevur tikið seg upp, tí at Sigurd Bærentsen ikki fekk starvið sum fyrstilærari, og tí er tað hann, sum hevur skyldina av stríðnum.

Hann leggur afturat, at vil Sigurd Bærentsen ikki av fríum vilja vil laga seg eftir teimum reglum, sum galda fyri arbeiðspláss hansara, skúlan í Skopun, má Mentamálastýrið onkusvegna má fáa ein enda á stríðnum.

Sakførarin vísir eisini á, at Ingun Simonsen ongar trupulleikar hevur við lærarum ella næmingum, ella við at stýra skúlanum – uttan tá ið talan er um Sigurd Bærentsen.

Hann sígur at enda, at foreldrini hava tikið atfinningarnar ímóti Ingun Simonsen úr leysum lofti. Atfinningarnar eru ikki undirbygdar og ikki eitt einasta ítøkiligt dømi er er nevnt, sum stuðlar uppundir skuldsetingarnar, sigur hann.

Og hann heldur eisini, at tað er sera álvarsamt at seta skuldsetingar fram á hendan hátt, tí tað setir bæði starvið og livibreyðið hjá henni í vanda.

Hann vísir eisini á, at foreldrini kenna bert málið frá øðrum partinum, og tey hava heldur ikki sæð alt í málinum.

– Eg haldi, at tygum ikki eiga at leggja tygum út í hetta persónsstríð ímillum Ingun Simonsen og Sigurd Bærentsen ella at taka partí, men at lata rætta myndugleikan taka sær av hesum, sigur Sakførarin útfrá teimum reglum, sum eru galdandi og ikki útfrá slatri og sleygi og persónligum kenslum, sigur hann at enda í brævinum til foreldrini.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!